# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Teir eru vælkomnir at veita okkum hjálp, men teir skulu ikki blanda seg upp í okkara politikk*
*(Robert Mugabe)*

# Mamma Nataschu kendi burturflytaran

**Fyrrverandi dómarin Martin Wahl vil vera við, at mamma Nataschu Kampusch er ikki so ósek, sum hon letst vera**



*Natadcha Kampuch.*

Í gjár byrjaði eitt rættarmál í sambandi við tað nógv umrødda málið um eysturríksku gentuna Nataschu Kampuch, sum kom afturíaftur í fjør eftir at hava verið horvin síðani 1998.

Í rættinum ætlar dómarin Martin Wahl at prógva, at Wolfgang Priklopil var ikki einsamallur um at burturflyta Nataschu Kampuch. Hann heldur uppá, at mamma hennara, Brigitta Sirny, var við til at burturflyta gentuna, og hann ætlar sær eisini at prógva, at Natascha Kampusch bleiv misbrúkt kynsliga, áðrenn hon bleiv burturflutt.

Málið hevur verið fyri í rættinum fyrr, og tá tapti Martin Wahl, tí rætturin helt ikki, at fyrrverandi dómarin hevði prógv fyri sínum pástandum. Men nú hevur Martin Wahl kravt, at málið skal ganga umaftur, og hesum hevur hann fingið viðhald í.

Rætturin í Wien hevur gjørt av, at foreldrini hjá Natashu Kampusch skulu vitna í rættinum. Martin Wahl hevur eisini kravt at sleppa at avhoyra Natashu Kampusch, men tað er ikki greitt, um hon kemur í rættin.

Martin Wahl hevur boðað frá, at hann ætlar sær at avhoyra fyrrverandi leiðaran á kriminaldeildini hjá løgregluni í Wien, Max Edelbacher. Í samrøðu við eitt sveisiskt blað hevur hann sagt, at løgreglan hevði alla tíðina illgruna um, at alt ruggaði ikki rætt í málinum um burturflytingina í 1998. Eitt nú kom løgreglan fram á eina mynd av Nataschu Kampuch. Á myndini var hon hálvnakin í ríðistyvlum og við ríðikoyrli í aðrari hondini.

– Hvør tekur eina tílíka mynd av sínum barni, spurdi Max Edelbacher í samrøðuni við sveisiska blaðið.

# – Teir kunnu heingja seg



**Zimbabwiski forsetin, Robert Mugabe, heldur lítið um teir vesturlendsku leiðararnar, sum finnast at stýri hansara. Teir kunnu heingja seg, sigur hann**

– Hatta er tað vanliga tvætlið, sum vit hoyra úr Vesturheiminum. Teir finnast at stjórnini, tí hon roynir at forða fyri harðskapi og at revsa harðskapsmenninar.

*Robert Mugabe heldur lítið um teir vesturlendsku leiðararnar, sum finnast at stýri hansara.*

Teir kunnu heingja seg, segði Robert Mugabe á tíðindafundi í høvuðsstaðnum Harare.

Viðmerkingin frá zimbabwiska forsetanum hevði samband við tilburðin, tá andstøðuleiðarin Morgan Tsvangirai varð illa viðfarin í varðhaldinum hjá løgregluni seinasta vikuskiftið. ST, USA og ES hava hvassliga fordømt framferðina hjá løgregluni og hótta við víðfevndum tiltøkum ímóti stýrinum hjá Mugabe.

Beint undan tíðindafundinum hevði Mugabe hitt forsetan í Tanzania, Jakaya Kik, sum var komin at royna semju millum stýrið hjá Mugabe og andstøðuna, men orðalagið hjá Mugabe bar ikki boð um semju.

–Taðvórumótstøðumenninir, sum byrjaðu harðskapin, men teir fáa ikki eina einastu atfinning úr Vesturheiminum. Vesturheimurin hevur alla tíðina stuðlað andstøðuni, og tí góðtaka vit ikki teirra atfinningar, segði Robert Mugabe. Hann legði tó afturat, at lond í Vesturheiminum eru vælkomin at veita Zimb-

## STUTT SAGT

### Eftirlit við miðlum

Í Russlandi hevur Vladimir Putin, forseti, staðfest eina kunngerð, sum gevur myndugleikunum heimild til at seta í verk eina skipan, sum skal hava eftirlit við russisku fjølmiðlunum. Russisk tíðindafólk hava longu boðað frá, at tey eru ímóti heimildini, tí eftir teirra tykki hevur tað almenna longu strangt eftirlit við fjølmiðlunum. Sambært teirri nýggju kunngerðini skal eitt nýtt eftirlit umsita útgávuloyvi til bløð og tíðarrit og sendiloyvi til útvarps- og sjónvarpsstøðir, og eftirlitið fær heimild til at taka loyvi aftur, um treytirnar ikki verða hildnar. Atfinningarsamar kreftir í Russlandi vilja vera við, at Vladimir Putin táttar takið um fjølmiðlarnar upp undir tjóðartingsvalið í heyst og forsetavalið næsta ár.

### Kann stilla upp

Tann víðgongdi høgrapolitikarin Jean-Marie Le Pen sleppur nú at stilla upp til franska forsetavalið í næsta mánað. Lógin krevur, at ein valevni skal hava minst 500 fólkavaldar stillarar, og í gjár eydnaðist tað Le Pen at fáa tær seinastu undirskriftirnar. Tann 78 ára gamli Le Pen hevur stillað upp til hvørt forsetaval líka síðani 1974 burtursæð frá valinum í 1981, tá hann ikki megnaði at fáa teir neyðugu stillararnar. Á seinasta forsetavali, í 2002, eydnaðist tað honum at fáa næstflestar atkvøður á fyrra valumfari, men seinni tapti hann til sosialistin Lionel Jospin.

### Írar og finnar drekka mest

Meiri enn triði hvør íri og meiri enn fjóðri hvør finnlendingur drekka meiri enn fimm øl ella fimm gløs av sterkum um dagin, og so nógv drekka eingir aðrar ES-borgarar. Næstir írum og finnlendingum koma bretar og danir, meðan italiumenn og portugisar eru teir, sum drekka minst. Eitt nú eru tað bara tvey prosent av portugisunum, sum drekka meiri enn fimm øl ella fimm gløs av øðrum rúsandi um dagin. Kanningin vísir eisini, at prísurin hevur týdning. Serliga finnlendingar og sviar halda, at teir høvdu drukkið meiri, um øl og annað sterkt var bíligari, enn tað er.